# KÍ visti einki

**Í tíðindaskrivi avsannar leiðslan í felagnum, at tey kendu nakað suk helst til ikki-skrásettu spælararnar undan dystinum móti Fram**

KÍ
*Jákup Mørk*

KÍ sendi seinnapartin týsdagin út tíðindaskriv, har tey upp á tað harðasta avsanna, at nakar í felagnum skal hava kent til vantandi spæliloyvini hjá trimum leikarum.

Skrivið er sent, eftir at vit í útgávu okkara í gjár skrivaðu, at seiglívað leysatíðindini hava gingið um, at felagið kendi til hetta.

Í tíðindaskrivinum sigur KÍ, at tá dómsnevndin hjá FSF ein av fyrstu døgunum skal viðgera málið, kunnu tey ikki viðgera málið alment í smálutum. Men felagið slær fast, at tey ikki vóru varugt við mistakið fyrr enn tann 24. mars. Samstundis setti felagið seg í samband við ÍF og FSF og ger vart við mistakið.

Somuleiðis sigur KÍ, at tey hava verið í samband við nevndarlimir í ÍF, og at hesi hava váttað, at talan ikki hevði verið um samband millum feløgini um spæliloyvi av nøkrum slag, áðrenn tann 24. mars.

At enda sigur KÍ, at málið um leikara loyvini verður av leiðslu felagsins tikið í størsta álvara og verður tí í løtuni roynt at gera alt fyri at felagið ikki verður straffa órímuliga hart ítróttarliga fyri eitt mistak sum er farið fram á skrivaraborðinum.

- Felagið fer sjávsagt at taka einhvørja niðurstøðu frá dómsnevndini til eftirtektar og kann felagið heldur ikki gera beinleiðis viðmerkingar til málið fyrr enn dómsnevndin er komin til eina niðurstøðu.

# Flaggdagsrenning

Felagið hjá blóðgevum í Suðuroy fer mánadagin 25. apríl kl 15.00 at skipa fyri flaggdagsrenning við skúlan í Trongisvági. Teinurin er 5 km. Øll fáa diplom, og heiðursmerki verða givin fyri bestu tíðirnar. Tiltakið varð roynt fyrstu ferð í fjør. Vit vóna at nøkur fleir finna vegin inneftir hesuferð, so vit fáa høvi til at breiða út kunnleika um okkara felag, samstundis sum vit hugna okkum. Enn er tørvur á nýggjum blóðgevarum fyri at røkka eitt gott grundarlag, og byrgja upp fyri tí frágongd sum nú einaferð er náttúrulig.

Tiltakið er alment og øll kunnu møta.

# Kurvabóltur í Hoydølum

Kurvabóltsfelagið Hamar fer leygardagin at skipa fyri kapping. Kappingin fer at ganga fyri seg í høllini í Studentarskúlanum í Hoydølum, og verður lagt fyri kl. 12.

Kappast verður í seks bólkum. Gentur 14-17, kvinnur, dreingir 10-14, dreingir 14-17, menn og mix.

-jm

# Birgir og ikki Meinhardt

Í blaði fyri tveimum vikum síðani varð nakað skrivað um, tá ÍF fyri 17 árum síðani vann 1-0 í Vági. Hetta var seinasti sigurin hjá ÍF í Vági fram til í ár.

Í greinini skrivaðu vit, at ta ferðina var tað Meinhardt Dalbú, sum var málskjúttin í tepra sigrinum, men hetta er tó ikki heilt rætt.

Málskjúttin í dystinum var Birgir Thomsen, so vónandi skuldi tann parturin nú verið komin upp á pláss.

-jm

## í býin













